# Postverkið avlop

Hóast tað íslendska samfelagið hevur verið og er í djúpari kreppu, megnaði landsins postverk at hava avlop í rakstrinum í fjør. Roknskapurin, sum júst er kunngjørdur, vísir, at fyritøkan hevði 92 milliónir íslendskar krónur í avlopi í 2009 ímóti 79 milliónum krónum árið fyri. Roknskapurin vísir eisini, at inntøkurnar vóru 3,7 prosent minni í fjør enn í 2008. Leiðslan í íslendska postverkinum sigur, at bræv- og pakkaflutningurin eru minkaðir nógv síðani seinasta ársfjórðing í 2008, og leiðslan væntar eisini minni flutning í komandi tíð.



# Fleiri fátækir danir

Tey seinastu fimm árini er talið á fólki við lítlari inntølu minkað støðugt í ES-londunum, men nú vísir ein nýggj kanning, at tað sama er ikki hent í Danmark. Samstundis vísa tøl hjá Arbejdernes Erhvervsråd, at tað eru meiri enn 200.000 fátæk fólk í Danmark í dag. Tað er umleið 30.000 fleiri enn fyri einum ári síðani, og tað er størsti vøksturin eftir einum ári í nýggjari tíð, skrivar Politiken. Tølini vísa eisini, at talið á fátækum dønum er vaksið 50 prosent síðani 2001. ES hevur lýst 2010 sum fátækraár, og danska stjórnin kemur í morgin við einari verkætlan fyri stríðið ímóti fátækradømi í Evropa.



# Fýra løgmenn skulu nú kannast og vigast

*Magni Laksáfoss og aðrur tinglimir vilja hava at vita um tað er galið við løgmanni ella um tað er galið við lógini*

**Nú skal ein umfatandi kanning setast í verk fyri at vita um allir løgmenn hesi síðstu 16 árini hava misrøkt sínar skyldur**

KANNINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit mugu vita, um tað er galið við lógini, ella um tað er galið við løgnanni.

Tað er orsøkin til, at Magni Laksáfoss og aðrir løgtingslimir nú royna at fáa nóg stóra undirtøku í Løgtinginum til at seta ein kanningarstjóra at kanna virksemið hjá øllum teimum fýra løgmonnunum, sum hava sitið, síðani nýggja stýrisskipanin kom í gildið í 1994.

Talan er um løgmenninar Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg, Jóannes Eidesgaard og Kaj Leo Johannesen.

Hesi seinastu árini hevur tað ferð eftir ferð víst seg, at landsstýrið brúkar nógv meiri pening til ávís endamál, enn tað er játtað á fíggjarlógini.

Hetta er eisini ein meirnýtsla, sum landsgrannskoðarin ferð eftir ferð hevur átalað, men tað hevur ikki hjálpt so nógv.

Eisini landsstýrismálanevndin hevur staðfest, at landsstýrisfólk hava brúkt pengar ólógliga.

Hinvegin verður staðfest í stýrisskipanarlógini, sum kom í gildi í 1994, at tað er løgmaður, sum hevur eftirlit við virkseminum hjá landsstýrisfólkunum.

Men tað eru fleiri løgtingslimir sum nú reisa spurningin við um teir ymsu løgmenninir hesi árini hava verið sína uppgávu vaksnir og hava røkt sína eftirlittskyldu so væl, sum lógin krevur.

Fyri at fáa slíkan kanningarstjóra, skulu 14 tinglimir skriva undir eina áheitan á formansskapin um at seta hann og so skal formansskapurin seta kanningarstjóra

Tað eru góð útlit fyri, at neyðug undirtøka fæst fyri eini slíkari áheitan formansskapin, tí tað eru eisini tinglimir úr samgonguni, sum hava skrivað undir, umframt at meginparturin av andstøðuni, kanska øll andstøðan, skrivar undir.

Av samgongulimunum høvdu Magni Laksáfoss og Edmund Joensen skrivað undir í morgun, men fleiri tinglimir úr andstøðuni eisini høvdu skrivað undir.

Nú varð upplýst í tinginum í gjár, at fíggjarstýringin batnar, tí í 2008 var meirnýslan 158 milliónir, men fyribils tøl vísa, at í fjør var hon bara 20 milliónir. Hví er tað so neyðugt at brúka pengar upp á ein kanningarstjóra, tí ið tað gongur rætta vegin?

– Vit halda, at tað hevur stóran týdning at fáa hetta staðfest, hví fíggjarstýringin er so linlig, um tað veruliga er so,at løgmenninir hava misrøkt sína skyldu, ella um tað er stýriskipanin, sum ikki er nóg nágreiniliga orðað á hesum øki, sigur Magni Laksáfoss.

– Veruleikin er, at landsstýrið hevur brúkt pening í heimildarloysi, uttan at tað verður rættað og tí er neyðugt at staðfesta, hvør hevur skyldina.

Hann sigur, at tí verður nú roynt at fáa undirtøku í Løgtinginum fyri at fáa ein kanningarstjóra at kanna hesi viðurskiftini út í æsir fyri at vita um tað veruliga eru løgmenninir, sum ikki hava røkt sína skyldu ella um tað er stýrisskipanin sum ikki er nóg nágreiniliga orðað.

– Tá ið tað er staðfest, ber til at taka tey stig, sum eru neyðugt fyri at bøta um fíggjarstýringina.

Hann sigur, at einasta orsøk til, at tað hevur gingið rætta vegin, er, at tinglimir úr andstøðuni hava lagt trýst á samgonguna og tað endaði við, at Hans Pauli Strøm noyddist at leggja frá sær í fjør.

# Guðrið Hansdóttir virkin í Kambodja

**R&G Learn Music eitur tónleikaátakið, sum Guðrið Hansdóttir og unnusti hennara Regin Dalsgaard hava sett ígongd í Kambodja**

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Tey hava sett ein tónleikaskúla á stovn, keypt gittarar og sett ein tónleikalærara í fulltíðarstarv. Á tónleikaskúlanum fáa eini 50 børn møguleika at læra gittarspæl. Verkætlanin fer fram á staðnum Siem Reap í samstarvi við kirkjuna á staðnum.

– Tað var tankin um at geva børnum ein møguleika at fáast við tónleik, sum fekk okkum til at taka hetta stig, sigur Guðrið Hansdóttir, sum við komandi hjúnafelagnum Regini W. Dalsgaard hevur ment og tikið stig til hetta tiltak, ið eisini leggur dent á at førleikamenna børnini, so at tey kunnu fáa eina betri tilveru í einum landi, har framtíðarútlitini eru ómetaliga døpur.

– Sjálv havi eg frá barnsbeini havt ómetaliga stóra gleði av mínum tónleikavirksemi, og vónandi kunnu hesi børnini eisini fáa okkurt burtur úr tónleikaundirvísingini, sigur Guðrið, sum í hesum døgum hevur úr at gera. Ein ferð til USA stendur fyri framman, og síðani skulu hon og Regin giftast.

Føroyingurin, Reimund Langgaard, arbeiðir sum volontørur fyri Heimamissiónini hjá Siem Reap Ministries, og hann letur heilsa, at spenningurin um nýggju verkætlanina er sera stórur, og væntar hann, at nógv fara at taka av ókeypis tilboðnum um guitarundirvísing.

Fyri umleið tveimum árum síðan gjørdi Heimamissiónin av at fokusera uppá eitt missiónsøki, og gera eyka stóran mun har, heldur enn at verða virkin í fleiri ymsum londum. Fyrsta landið, sum Heimamissiónin valdi at seta fokus á, var Kambodja.

